ÍTRÓTTUR FÓTBÓLTUR LØGMANSSTEYPIÐ

DYSTURIN HESA VIKUNA

Seinasti sigurin hjá HB í kappingini um Løgmanssteypið var í 2004. Síðani tá hevur liðið bert fýra ferður leikt seg í hálvfinalurnar, um vit telja árið í ár við, og bert eina ferð hevur tað eydnast liðnum at vinna seg í finaluna. Hetta var í 2007. Sostatt eru tað sjey ár síðani, at HB var í steypafinaluni seinast.

AVRIK: *tøl 1 til 6*

Heðin Stenberg 4
Stóð ein sera góðan dyst. Hevði fleiri góðar bjargingar og fekk ikki gjørt stórvegis við málini hjá HB.

Jónas Stenberg 2
Rennur nógv og arbeiðir væl, men tykist sum heild ov ótryggur bæði offensivt og defensivt.

Jógvan Isaksen 3
Spældi ein fínan dyst. Flytir seg væl og stýrir verjuni væl, og megnar í flestu førunum at rudda upp, tá vandi var á ferð. Átti tó møguliga at steðga Andrew við seinna málið.

Sørin Samuelsen 3
Stóð væl defensivt, og megnaði eisini í fleiri førum at rudda væl upp í vandastøðum. Tók eingi óráð fyri defensivt, men var samstundis eitt sindur ótryggur á bóltinum.

Beinir Ellefsen 3
Spældi væl defensivt, har hann hevði rættiliga gott tak á høgri síðuni hjá HB. Kom eisini væl fram við í vinstru síðu, men kvaliteturin var ov lítil á innleggum.

Jobin Drangastein 2
Arbeiðsinnsatsurin liggur ongantíð eftir, men sum heild kom alt ov lítið burturúr. Hann tóktist ikki rættiliga at føla seg heima á høgra vongi – í øllum førum ikki í hesum dystinum.

Hørður Mohr 3
Hevði nakað av trupulleikum defensivt móti sterka HB-miðvøllinum, men gjørdi tað hampiligt offensivt. Hevði onkra skotroynd og slepti sær sum heild væl av við bóltin.

Kári Nielsen 2
Hevði trupulleikar av smáspælinum hjá HB, og kom ikki rættiliga til sín rætt, tá AB var á bóltinum.

Sorin Anghel 3
Var naskur og avbjóðandi fyrstu løtuna av dystinum, og skapti nakrar góðar støður í vinstru síðu. Fall eitt sindur í støði eftir hetta og var heldur anonymur í seinna hálvleiki.

Bárður Olsen 3
Hevði fleiri góðar deyðbóltar og var ein av fáu AB-leikarunum, ið var tryggur á bóltinum. Fekk tó alt ov lítið av hjálp fram eftir vøllinum.

Karstin Højgaard 2
Arbeiddi væl og rann nógv, men lítið kom burtur úr nógvu túrunum fram eftir vøllinum. Fekk ein gyltan møguleika eftir stórt verjukiks hjá HB, men royndin var alt ov óneyv.

Mikkjal Hentze 2
Kom inn á offensiva miðvøllinum, men megnaði ikki veruliga at seta síni fingramerki á dystin.

Christian í Garði 2
Skapti saman við Magnusi Egilsson nakað av óróð í HB-verjuni, tá hann kom á vøllin, men í fleiri góðum støðum tók hann skeivar avgerðir.

Magnus Egilsson 3
Fekk ikki nógvar minuttir á vøllinum, men megnaði at skapa nakað av óróð í HB-verjuni seinastu løtuna av dystinum.

HB TRYGT Í HÁLV-FINALUNA

Eftir steðgin hevði HB fult tamarhald á dystinum á Argjum, sum teir eisini vunnu fult uppiborið. Men í fyrra hálvleiki beit heimaliðið frá sær og hevði fleiri naskar royndir

(0-1) **0-2**

Teitur Joensen

0-1: Heini Vatnsdal 17.
0-2: Andrew av Fløtum 81.
Dómari: Rúni Gaardbo



Heðin Stenberg var aftur í AB málinum, eftir at hann hjálpti júst HB í steypadystinum móti B36

Tað ljóðar sum ein nógv spæld, gomul og skøva pláta, men HB var aftur rættiliga stórur favorittar, tá liðið var á vitjan úti í Vika á Argjum í gjár í fjórðingsfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið.

Men hóast liðið var roknað sum stórfavorittur, so sást hetta ikki fyrstu løtuna av dystinum. AB beit nevniliga heilt væl frá sær fyrsta 10 minuttirnar, og liðið kom eisini fram til fleiri góðar støður, men lítið kom hóast tað burtur úr nógvu støðunum.

Tað var serliga í vinstru síðu, at tað riggaði væl hjá AB hesa løtuna. Sorin Anghel var væl upplagdur, og hann megnaði í fleiri førum at koma oman á baklinjuna inni í brotsteiginum, men har var ongantíð nakar AB-leikari klárur, tá rumenin legði tvørturum.

Men HB kom spakiliga betur við í dystin, og eftir eitt korter komu teir á odda við máli frá Heina Vatsndal, sum kom at standa væl fyri í brotsteiginum eftir eitt hornaspark. Stutt framman undan hevði HB verið tætt við at lagt seg á odda eisini eftir hornaspark, og hesa løtuna hevði HB havt munin.

Tað,ið eftir var av fyrra hálvleiki, stýrdi HB, men hóast hetta, so hevði AB tær naskastu royndirnar. Í tveimum førum vóru teir tætt við at skalla bóltin í mál. Fyrst eftir eitt frísparksinnlegg og síðani eftir eitt hornaspark, og seint í fyrra hálvleiki áttu argjamenn at havt javnað, tá Karstin Højgaard gjørdist púra leysur eftir ein stóran feil í HB-verjuni. Áleyparin brendi tó upp á tað skammligasta, og so var HB á odda í steðginum.

HB sat á øllum

Meðan dysturin hevði verið javnur fyri steðgin, so var myndin ein heilt onnur eftir steðgin. HB setti seg nú fullkomiliga á dystin, og AB megnaði als ikki at leggja nakað trýst á HB.

Hvørja ferð argjamenn royndu at koma niðan á vøllinum í trýstinum, so kom HB til góðar støður, og tað tóktist mest sum bara at vera ein spurningur um tíð, áðrenn HB økti um leiðsluna.

Tað gekk tó rúm tíð, áðrenn hetta hendi, men 10 minuttir fyri leiklok bragdaði aftur hjá HB, tá Andrew av Fløtum heldur tilvildarliga kom at standa væl fyri í brotsteiginum. Í fyrstu atløgu rakti hann ikki bóltin, men í aðru atløgu fekk hann lagt bóltin millum beinini á Heðin Stenberg og í málið, og so var dysturin avgjørdur.

Frammanundan hesum hevði HB havt fleiri góðar møguleikar at økt um leiðsluna, so tí var tað heilt í tráð við spæl og møguleikar, at tað eydnaðist HB at økja um leiðsluna.

2-0 gjørdist endaliga úrslitið, og HB hevur tí spælt seg víaðri til hálvfinalurnar í steypakappingini.

Góður seinni hálvleikur

Ein av leikarunum, sum spældi ein sera góðan dyst fyri HB, var Christian R. Mouritsen. Hann var nøgdur við úrslitið, men var ikki heilt nøgdur við allan dystin.

– Eg eri ikki heilt nøgdur við fyrra hálvleikin hjá okk-